FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

# Meeting of the UFI Board of Directors

| | |
|---|---|
| **Date:** | September 2, 2022 |
| **Time:** | 3 hours (8:30-11:30) |
| **Place:** | NÁD, Faculty of Education, Frælsið, Room 74 |
| **Participants:** | *Board members:*<br>Ólavur Ellefsen (Chair)<br>Marita Rasmussen (Deputy Chair)<br>Anders Bjarklev (External Member)<br>Elaine Munthe (External Member)<br>Marin Strøm (Staff Representative)<br>Jónrit Halling (Staff Representative)<br>Anita Hansen (Student representative)<br><br>*Deputy board members:*<br>Anna Kirstin Sigurðardóttir (Deputy External Representative)<br>Heidi Poulsen (Deputy External Representative)<br>Magnus Gaard, (Deputy External Representative)<br>Firouz Gaìni (Deputy Staff Representative)<br><br>*University administration attendees:*<br>Chik Collins (Rector)<br>Johan Hansen (University Director)<br>Súsanna Jógvansdóttir Golan (Executive Secretary)<br>Katrin Poulsen (HR-coordinator) participated under item 7<br><br>Could not attend:<br>Anna Sofía Lava (Deputy Staff Representative) is on maternity leave |
| **Minutes by:** | Súsanna Jógvansdóttir Golan |

*See Faroese translation of minutes on page 7/Sí føroyska umseting á síðu 7*

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Agenda for Board Meeting: Friday 2nd September 2022, 8:30-11:30 (with coffee/breakfast from 8:00)

**Venue:** The meeting will be 'in person' at the Faculty of Education, Frælsið, Stova-74. Directions can be provided for external members.

***Main purpose of the meeting:*** *For the Board to receive updates on, and have an opportunity to discuss, the ongoing business of the University, with a particular focus on the current external review process and the impending visit of the external review team, and also the impending departure of the current Rector and the process for recruiting a successor.*

**Proposed Agenda:**

| | |
|---|---|
| **Coffee/breakfast from 8:00 in the meeting room** | |
| **Part 1: 08:30-09:40: Ongoing Business** | |
| **Item** | **Recommendation to the Board** |
| 1. Chair's welcome (including replacement deputy Board Member) and approval of Agenda (Paper 1) | To approve subject to any amendments. |
| 2. Approval of minutes from meeting of 10th June 2022 (Paper 2) | To approve subject to any additions/changes |
| 3. Finance Report (Head of Finance/University Director): January-July 2022 (Paper 3) | To note and discuss |
| 4. Report on consultations since last meeting (University Director) (Paper 4) | To note the contents of the paper. |
| 5. Brief update from the Campus Group (Oral Report from Chair) | To note and discuss |
| 6. Rector's report on the period since last meeting (Oral Report) | To note, subject to discussion. |
| 7. Position of Rector at the University: Resignation of incumbent and process for new recruitment (Oral Report and Discussion) | To discuss and agree next steps |
| **09:40-10:00:** *Comfort and Refreshment Break* | |
| **Part 2: 10:00-11:30: The External Review of our University** | |
| 8. The production and content of the main review documents and what happens from here (Oral Report from Rector and University Director – review documents available in Folder on OneDrive) | None |
| 9. Discussion and Feedback from Board members on the review documents and the review process | Discussion and suggestions |
| 10. Looking forward to the conclusion of the review process and the next Strategic Plan with new University Leadership | Discussion and suggestions |
| 11. Chair's summation and concluding remarks | None |
| **11:45 Lunch in Canteen at Frælsið – followed by participation in Staff Outing for External Board Members** | |

*1. Chair's welcome (including replacement deputy Board Member) and approval of Agenda (Paper 1)*
Magnus Gaard was welcomed to his first board meeting, replacing Páll Isholm, who had been appointed to the staff at the University. Magnus introduced himself as rector/principal at the upper secondary school 'Fiskivinnuskúlin'. He is a biologist and previous curator of plants at the national museum.

The agenda for the meeting was then approved.

*2. Approval of minutes from meeting of 10th June 2022 (Paper 2)*
The meeting went through the previous minutes and noted these points:

- It was considered good that action points are included, gives a clearer overview. The Rector explained that this is the convention for all of the main University meetings.

- Martin Zachariasen has not been replaced on the board as his position at the University was temporary. However, as his temporary contract has now been extended, the Board requested to find a deputy replacement.
  **Action point: ÓE to get in touch with the Ministry about replacement for MZ.**

- We need to continue to create awareness of rising costs of oil and electricity, and more generally controlling expenditure and costs - also by focusing on basic things such as printing/not printing, printing in black and white, and other things.
  **Action point: JH to progress this with Head of Finance and to report to next meeting**

- ÓE has been in touch with the Ministry briefly about allowing flexibility on the student grant (so parttime students be eligible) but there is more work to do and discussions to have.
  **Action point: ÓE to follow up with Ministry and report to next meeting**

- The new Student Council (Ráð Teirra Lesandi) has their first meeting today. We will then ask the council to appoint a deputy member to the board.
  **Action point: JH to follow up and report by end of September**

- A student representative for the campus group has already been appointed (Anita Hansen, Board Member).

The minutes from the last board meeting were then approved.

*3. Finance Report (Head of Finance/University Director): January-July 2022 (Paper 3)*
The Head of Finance could not attend to present his regular report, so JH presented a summary of the finance status. The current numbers indicate that we are heading towards a surplus. This seems to mainly be due to existing positions not being filled as soon as originally expected. In some cases due to unexpected reasons (loss of colleague) and in other cases obstacles in hiring staff on time, also having to do with visa challenges for potential candidates coming from abroad. The Faculty of Science and Technology had planned to hire 6 positions this year but only 2 are actually in position at this stage (with two more to come later). Furthermore, the costs for external teachers are usually higher during the second half of the year, so those expenses are to rise now. However, if the surplus will be as currently indicated, the plan is to renovate 'Lindbergs house' and use if for student and teachers housing. Lindberg is a home that was donated to the university. It was used for student and staff housing but is in bad shape now so is not being used anymore. The board will get a fuller finance report shared later this month via email.

**Action point: JH to arrange for a fuller finance update to be circulated to the Board by Friday 16th September.**

*4. Report on consultations since last meeting (University Director) (Paper 4)*
Since the last board meeting the university has nominated members to these committees/boards:

- Fjølmiðlanevndin (Mass Media Committee)
- Miðlastuðulnevndin (Media Subsidies Committee)
- Ráðgevandi nevndin fyri Norðurlandahúsið (Advisory Board for the Nordic House)

In addition, Setrið has been asked to give response to a questionnaire from the 'Board for Research, Development and Innovation' to which our Research and Enterprise Unit provided an answer. We have also been asked to comment on proposal with regard to the law on bankruptcy in the Faroes (we had no comment) and on the executive order on regulating (increasing) the student grant (we supported the proposal).

*5. Brief update from the Campus Group (Oral Report from Chair)*
Since the last board meeting the campus group has met for a full day away to discuss the requirement for the main building in preparation for the architectural competition that was scheduled to take place this fall. The process is led by Landsverk, who have been busy with another architectural competition so there is a bit of delay for us, and so it might spill into early next year. If that happens, we need to make sure that we can transfer the funds for the competition (5 million DKK) over to next year.

The building at Frælsið/Faculty of Education is to be given to us in a – still conditional – agreement between the Ministry and the Municipality. Frælsið was partially (40%) owned by the Municipality but is now to be handed over to the Ministry in return for the Municipality getting ownership of the old upper secondary school at Hoydalar. On top of this, the University is to move out of Sjóvinnuhúsið (owned by the Municipality) gradually over the next two years. In 1990 the Municipality gave the University a land of around 50.000 m2 by Marknagil as a gift for the future university campus. The gift was never registered ('tinglýst') and there has been some discussion back and forward on the legal aspect of the gift. As part of the agreement, the government/UFI will abandon all claims to the gifted area. However, the whole agreement is contingent on that the Minister will get 144 million DKK approved by the parliament this fall for refurbishing Frælsið wing by wing over 6 years.

Not directly part of the campus plan, but however related, wing 7 (lon 7) of Frælsið was partially refurbished during the summer break in order to allow for teaching (DHS in first instance). Although we were sceptical of the timeline in the last board meeting, the refurbishment was completed on time (12th August). Our new IT Manager, JH and other UFI staff have assisted with this work, e.g. to ensure proper installation of IT equipment etc.

It has been a challenge to get to the point where we are now with the conditional campus agreement, but it eventually progressed once we got the Municipality and the Ministry to meet with us together. The board then had further reflections on the commitments of the Municipality to make the city a university city. Several university staff have just been to Iceland and were struck by the amount of government support and funding for university buildings, both in Reykjavík and in Akureyri. Likewise, in Stavanger, a relatively small city in Norway, the municipality has a university strategy. This is inspirational. There were further reflections on how we can make our influence on the Municipality, also by encouraging our students to use their voices. There was agreement on that we need to make our voices heard and emphasise the importance of a university in wider society.

**Action point: Chair of Board/Campus Group to provide further update at next meeting.**

*6. Rector's report on the period since last meeting (Oral Report)*
The rector gave an update on these matters: Frælsið, graduations 2022, the graduate destinations survey and qualitative feedback, retention and progression status, Studni and Próvbókin (recent focus in the media), project on strengthening the student administration, 2022 student intake, NVD updates, the MCPDC process 2022-2023, meeting with the extended university leadership team, Japanese film festival, recent meetings with the Ministry, new student council and the upcoming visit of the British ambassador. For some more details see appendix 1.

The board had a discussion on part-time studies. The university is looking into offering more part-time study options in order to adjust to the needs of Faroese society (e.g. for students with kids and financial obligations). On top of not being eligible for the Studni student grant if enrolled half time, the discussion here focused more on the need to restructure programs if going to offer part-time studies. Furthermore, it was emphasised that there will need to provide extra administrative support if going to offer part-time programs so that the administrative coordination will not lay entirely on those teaching the program. A working group will look further into this (Director, Student Affairs and Quality Unit). There was also a further brief update on how NVD is progressing since the staff survey.

**Action point: University Director to provide report on progress of working group at next Board meeting.**

*7. Position of Rector at the University: Resignation of incumbent and process for new recruitment (Oral Report and Discussion)*
CC and JH were absent when this item was discussed. Katrin Poulsen, from HR, was present. The discussion is noted in a separate document (journal nr. 22/00288-1).

Part 2

*8. The production and content of the main review documents and what happens from here (Oral Report from Rector and University Director – review documents available in Folder on OneDrive)*
CC presented the review process and the content of the reflective analysis document including the additional case study. There has been a core working group working on the main document and several other colleagues have given their input. Staff have also been consulted in the process with two all-staff events last year and one last Wednesday (August 31, 2022) focusing on presenting the content to staff and discussions of the content.

Emphasis has been made so that staff understand the documents and will be prepared to meet the external review team if requested. Furthermore, emphasis has been made in the document to make clear where we are coming from and how we are planning to progress from there. A meta-analysis has been presented which proposes that our challenges can usefully be thought of in terms of five, key interacting themes, as follows:

- Who are we (identification)
- Taking our place in the world (internationalisation)
- Eitt samlað setur (integration)
- Consistent high standards (professionalisation)
- Personal ownership (activation)

For more details on the content of CC's presentation see the shared One Drive folder for the board.

*9. Discussion and Feedback from Board members on the review documents and the review process*
The feedback from the board of the documents was that it is very honest. We are clear about our challenges and how we are going forward from there. There was some discussion on the level of openness such an honest document could or ought to have. However, overall, there was an agreement about that it also shows strength to own the problems in such a transparent document.

There was also given some background to why the university had not followed the vital recommendation about quality assurance and enhancement from the last external review, as the current review team has asked about that.

Overall, the board noted that the documents are good and professional and well prepared for the review team that will visit in the days of 12-16 September 2022. Board members are eager to see the results of the review process.

*10. Looking forward to the conclusion of the review process and the next Strategic Plan with new University Leadership*
This item was not discussed and is to be on the agenda for the next board meeting.

**Action point: Rector to report on progress of review process and on draft conclusions and recommendations, and responses, at the next Board meeting.**

*11. Chair's summation and concluding remarks*
The chair of the board thanked everyone for coming to the meeting, also from abroad. The next board meeting will be on the 24th of November 2022 and hopefully everyone will be able to attend in person.

**The meeting ended at 11:45.**

*See Faroese translation below*

---

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Føroysk umseting av fundarfrásøgnini frá stýrisfundinum

## Skráin fyri stýrisfundin fríggjadagin 2. september 2022, kl. 8:30-11:30

**Staður:** Námsvísindadeildin, Frælsið, stova 74.
**Høvuðsendamálið við fundinum:** Kunning til stýrið um virksemið hjá Setrinum við serligum atliti at uttanhýsis eftirmetingini av Setrinum og komandi vitjanini av uttanhýsis eftirmetingarbólkinum, umframt rektaraskiftið og tilgongdina til rektarasetan.
Skráin:

| | |
|---|---|
| **Kaffi/morgunmatur frá kl. 8:00 í fundarhølinum** | |
| **Fyrri partur: 08:30-09:40: Framhaldandi virksemi** | |
| **Evni** | **Viðmæli til stýrið** |
| 12. Stýrisformaðurin bjóðar vælkomin við kunning um varalim og góðkenning av skrá (skjal 1) | At góðkenna skránna við møguligum broytingum |
| 13. Góðkenning av fundarfrásøgnini frá fundinum 10. juni 2022 (skjal 2) | At góðkenna fundarfrásøgnina við møguligum broytingum |
| 14. Fíggjarfrágreiðing (fíggjarleiðarin/fyrisitingarstjórin): januar-juli 2022 (skjal 3) | Til kunningar og orðaskifti |
| 15. Frágreiðing um hoyringsumbønir v.m. síðani seinasta fund (fyrisitingarstjórin) (skjal 4) | Til kunningar |
| 16. Stutt kunning frá kampusbólkinum (munnlig frágreiðing frá stýrisformanninum) | Til kunningar og orðaskifti |
| 17. Frágreiðing frá rektaranum um gongdina síðani seinasta fund (munnlig frágreiðing) | Til kunningar og møguligt orðaskifti |
| 18. Rektarastarvið á Setrinum: Fráfaring av verandi rektara og tilgongdin til nýggja setan (munnlig frágreiðing og orðaskifti) | Til orðaskifti og samtykkja setanartilgongdina |
| **09:40-10:00: Steðgur** | |
| **Seinni partur: 10:00-11:30: Uttanhýsis eftirmetingin av Setrinum** | |
| 19. Skrivingin og innihaldið av høvuðsfrágreiðingini og næstu stigini (munnlig frágreiðing frá rektara og fyrisitingarstjóra – skjølini eru atgongd í OneDrive-mappuni) | Onki |
| 20. Kjak og afturboðanir frá stýrislimunum um innihaldið av eftirmetingarskjølunum og tilgongdini | Orðaskifti og tilráðing |
| 21. Møguligar niðurstøður frá uttanhýsis eftirmetingini og næsta strategiætlan við nýggjari leiðslu | Orðaskifti og tilráðing |
| 22. Stýrisformaðurin tekur samanum | Onki |
| **11:45 Miðmáli í kantinuni á Frælsinum og síðani starvsfólkaútferð** | |

1. *Stýrisformaðurin bjóðar vælkomin við kunning um varalim og góðkenning av skrá (skjal 1)*

Magnus Gaard varð boðin vælkomin til sín fyrsta stýrisfund. Hann er nýggjur limur fyri Páll Isholm, sum fór frá fyrr í árinum vegna starvssetan á Setrinum. Magnus er rektari/skúlastjóri á Fiskivinnuskúlanum. Hann er lívfrøðingur og fyrrverandi savnsvørður á Tjóðsavninum.
Skráin fyri fundin varð síðani góðkend.

2. *Góðkenning av fundarfrásøgnini frá fundinum 10. juni 2022 (skjal 2)*

Stýrið gekk í gjøgnum fundarfrásøgnina frá seinasta fundi, og hevði hesar viðmerkingar:

- Gott, at 'atgerðir' (action points) eru til fundarfrásagnirnar. Hetta gevur eitt lættari yvirlit. Rektarin viðmerkti, at hetta er leisturin fyri allar leiðslufundir.

- Ongin stýrislimur er enn tilnevndur í staðin fyri Martin Zachariasen, tí hansara setan á Setrinum var upprunaliga tíðaravmarkað.
  **Atgerð: ÓE at seta seg í samband við Uttanríkis- og mentamálaráðið um at fáa nýggjan lim í Stýrið fyri MZ.**

- Við hækkandi el- og oljuprísum eiga vit framhaldandi at gera starvsfólk varug við at lækka óneyðugar rakstrarútreiðslur, so sum at heldur prenta út í svørt/hvítum enn litum ella yvirhøvur at umhugsa, um neyðugt er prenta út og so víðari.

  **Atgerð: JH at fylgja upp við fíggjarleiðaranum og kunna á næsta fundi**

- ÓE hevur verið í samband við Uttanríkis- og mentamálaráðið um eina liðiligari tilgongd til at fáa lestrarstuðul, so parttíðarlesandi eisini fáa rætt til stuðul, men meira arbeiði og viðgerð skal til.

  **Atgerð: ÓE at fylgja upp við UMMR til næsta fund.**

- Nýsetta Ráð teirra lesandi høvdu fund í dag. Tey verða í næstum biðin at tilnevna ein varastýrislim fyri lesandi til Stýrið.

  **Atgerð: JH at fylgja upp til næsta fund.**

- Eitt umboð fyri tey lesandi er komið í kampusbólkin (Anita Hansen, stýrislimur).

3. *Fíggjarfrágreiðing (fíggjarleiðarin/fyrisitingarstjórin): januar-juli 2022 (skjal 3)*

Fíggjarleiðarin fekk ikki møtt á fundi at leggja fíggjarfrágreiðingina fram, so JH legði ein samandrátt av fíggjarstøðuni fram. Tølini benda á, at vit eru á veg til eitt yvirskot fyri árið. Hetta er í høvuðsheitum, tí størv ikki eru sett so skjótt, sum upprunaliga ætlað vegna m.a. setanaravbjóðingar, har uttanlandsumsøkjarar høvdu trupulleikar við innfararloyvum, og eisini vegna deyðsfall. Náttúruvísindadeildin hevði lýst seks størv leys, men einans tvey av teimum eru sett higartil, og tvey afturat verða væntandi sett seinni. Eisini er lønarkostnaðurin fyri leysalærarar vanliga hægri í seinnu helvt av árinum, so har hækkar nú. Tó so, um yvirskot verður, sum tað sær út til í løtuni, so er ætlanin at umvæla Lindsbergshús til at hýsa lesandi og undirvísarum. Lindbergshús eru eini sethús, sum vóru givin í gávu til Setrið á sinni. Tað bleiv tá brúkt til lestrarkømur og eisini at hýsa undirvísarum, men húsini er í so ringum standi nú, at tað

hevur ikki verið brúkt til hetta seinnu árini. Stýrið fær eina longri fíggjarfrágreiðing sendandi seinni í mánaðinum.
**Atgerð: JH at syrgja fyri at Stýrið fær eina longri fíggjarfrágreiðing sendandi innan fríggjadagin 16. september.**

*4. Frágreiðing um hoyringsumbønir v.m. síðani seinasta fund (fyrisitingarstjórin) (skjal 4)*

Síðani seinasta fund hevur Setrið tilnevnt limir til hesar nevndirnar:

- Fjølmiðlanevndin
- Miðlastuðulsnevndin
- Ráðgevandi nevndin fyri Norðurlandahúsið

Eisini hevur Setrið (Granskingar- og framtakseindin) svarað spurnarblaði frá Ráðnum fyri gransking, menning og nýskapan. Vit eru eisini biðin um at koma við viðmerkingum til ríkislógartilmælið um dagføring av konkurslógini fyri Føroyar, har vit ikki høvdu viðmerkingar. Eisini vóru vit spurd um viðmerkingar til kunngerðina um at hækka lestrarstuðulin, sum vit stuðlaðu.

*5. Stutt kunning frá kampusbólkinum (munnlig frágreiðing frá stýrisformanninum)*

Síðani seinasta stýrisfund hevur kampusbólkurin verið á einum heildagsfundi í sambandi við fyrireiking av arkitektakappingini um høvuðsbygningin, sum eftir ætlan skuldi bjóðast út nú í heyst. Landsverk skal leiða tilgongdina, og hevur verið upptikið av aðrari arkitektakapping, og tí dregur hendan út, so møguliga verður útbjóðingin tíðliga næsta ár heldur. Um hetta verður, so mugu vit tryggja, at vit kunnu flyta játtanina til kappingina (5 milliónir krónur) til næsta ár.
Setrið skal eftir ætlan fáa bygningin á Frælsinum (gamla læraraskúlan), men hetta er enn tongt at eini avtalu millum Uttanríkis- og mentamálaráðið og Tórshavnar kommunu, sum enn ikki er endalig. Tórshavnar kommuna átti upprunaliga 40% av bygninginum á Frælsinum, men tað er nú latið Uttanríkis- og mentamálaráðnum í býti við gamla studentaskúlan í Hoydølum, sum kommunan nú hevur fingið. Partur av avtaluni er eisini, at Setrið flytur út úr Sjóvinnuhúsinum næstu tvey árini, tí kommunan skal brúka bygningin. Í 1990 lat Tórshavnar kommuna Setrinum eitt gávubræv til eitt grundstykki á umleið 50.000 m2 í Marknagili, sum skuldi nýtast til eitt nýtt setur. Gávan bleiv ongantíð tinglýst, og tað hevur verið eitt sindur av orðaskifti aftur og fram hvønn løgfrøðiligan týdning gávan hevur. Sum part av avtaluni millum kommununa og UMMR sleppir Fróðskaparsetrið kravinum um 'gávuna'. Tó so, øll avtalan er treytað av, at Uttanríkis- og mentamálaráðharrin fær játtaðar 144 milliónir krónur frá Løgtinginum at umvæla Frælsið lon fyri lon komandi 6 árini.
Ikki beinleiðis partur av kampusætlanini, men tó so, var lon 7 partvíst dagførd í summar fyri at hýsa DHS flokkum. Seinasta stýrisfund vóru vit heldur ivasom um, hvørt dagføringini av lonini fór at vera klár við lestrarbyrjan, men tíbetur var klárt 12. august. Okkara KT-leiðari, JH og onnur setursstarvsfólk vóru væl uppi í tilgongdini, t.d. við at tryggja nøktandi innlegging av KT-útgerð v.m.
Tað hevur verið avbjóðandi at komið til punktið, sum vit nú eru komin til, við kampusavtaluni, men tað gekk framá, tá vit endiliga fingu Tórshavnar kommunu og Uttanríkis- og mentamálaráðið at tosa saman. Síðani kom stýrið við hugleiðingum um, hvørt kommunan er fullhugað at binda seg til at gera býin til ein universitetsbý. Fleiri starvsfelagar hava júst verið í Íslandi á vitjan, og vóru hugtikin av, hvussu stuðlandi stjørnin hevur verið í samband við fígging av universitetsbygningum, bæði í Reykjavík og í Akureyri. Í Stavanger í Noregi hevur kommunan eisini eina universitetsstrategi. Hetta er hugtakandi. Tað varð eisini víðari víst á, hvussu vit kunnu ávirka kommununa, eisini við at eggja okkara lesandi til at taka lut í almenna samskiftinum.

Stýrið var samt um, at vit mugu brúka okkara rødd og leggja áherðslu á týdningin, okkara Setur hevur fyri restini av samfelagnum.
**Atgerð: Stýrisformaðurin/kampusbólkurin at kunna víðari á næsta stýrisfundi.**

6. *Frágreiðing frá rektaranum um gongdina síðani seinasta fund (munnlig frágreiðing)*

Rektarin dagførdi Stýrið um Frælsið, prógvhandan 2022, spurnakanningina um hvar lesandi starvast eftir lestur, tølini yvir lestrarframgongd og at halda lesandi til, Studna og próvbókina (sum var frammi í miðlunum fyri stuttum), arbeiðið við at styrkja lestrarfyrisitingina, lestrarupptøka 2022, NVD, menningarsamrøðurnar 2022-2023, fundirnir við víðkaða leiðslutoyminum, Japanski filmsfestivalurin, nýggjastu fundirnir við UMMR, nýsetta Ráð teirra lesandi, og komandi vitjanin hjá bretska sendiharranum. Sí fylgisskjal 1 fyri nærri kunning.
Orðaskiftið var síðani um parttíðarlestur. Setrið kannar møguleikarnar fyri at bjóða parttíðarlestur fyri at laga seg eftir tørvinum í samfelagnum, tá fleiri av okkara lesandi hava børn og fíggjarliga ábyrgd, og harvið ikki altíð møguleika fyri fulltíðarlestri. Sum nú er, er ikki møguleiki fyri at fáa útgjald frá Studna, um ein ikki er innskrivaður til fulltíðarlestur. Umframt hetta, so var eisini kjak um tørvin at umskipa útbúgvingarnar, um vit í framtíðini bjóða parttíðarlestur. Hetta fer eisini at krevja meiri fyrisiting, so at samskipanin av hesum ikki fer at liggja á lærarum einans. Ein arbeiðsbólkur við fyrisitingarstjóranum, lestrarskrivstovuleiðaranum og góðskueindini verður settur at hyggja nærri at hesum.
**Action point: Fyrisitingarstjórin at kunna um gongdina hjá arbeiðsbólkinum á næsta stýrisfundi.**

7. *Rektarastarvið á Setrinum: Fráfaring av verandi rektara og tilgongdin til nýggja setan (munnlig frágreiðing og orðaskifti)*

CC og JH vóru ikki til staðar undir hesum punktinum. Katrin Poulsen frá HR var til staðar. Viðgerðin er niðurskrivað í øðrum skjali (journal nr. 22/00288-1).

8. *Skrivingin og innihaldið av høvuðsfrágreiðingini og næstu stigini (munnlig frágreiðing frá rektara og fyrisitingarstjóra – skjølini eru tøk fyri stýrinum á One Drive faldaranum)*

CC greiddi frá tilgongdini og innihaldinum í frágreiðingini til uttanhýsis eftirmetingarbólkin og eisini stakkanningarnar. Fýra hava verið í kjarnuskrivibólkinum til høvuðsskjalið, og so hava fleiri afturat hjálpt til. Øll starvsfólk eru eisini tikin við í tilgongdini á tveimum starvsfólkatiltøkum, einum síðsta ár og einum fyrr í vikuni (31. august 2022), har frágreiðingin var løgd fram við orðaskifti um innihaldið.
Dentur hevur verið lagdur á, at starvsfólk skilja innihaldið í skjølunum, og eru fyrireikað at møta uttanhýsis eftirmetingarbólkinum, um spurd. Eisini hevur dentur verið lagdur á at gera greitt, hvat útgangstøðið hjá Setrinum er - hvar vit koma frá, og hvussu vit halda fram her frá. Ein meta-greining er gjørd, sum kókar okkara avbjóðingar niður í 5 evni:
- Hvørji eru vit (identification)
- Staðseting á altjóða pallinum (internationalisation)
- Eitt samlað setur (integration)
- Einsháttað høgt støði (professionalisation)
- Ognarskapur (activation)

Fyri meira kunning sí power point-framløguna á One Drive hjá stýrinum.

9. *Kjak og afturboðan frá stýrislimunum um innihaldið av eftirmetingarskjølunum og tilgongdini*

Afturboðanirnar vóru, at høvuðsgreiningin er erlig. Vit eru opin um verandi avbjóðingar, og hvussu vit ætla at mennast út frá verandi umstøðum. Eisini var nakað av orðaskifti um, hvussu opið eitt slíkt skjal kundi ella eigur at vera. Samanumtikið varð stýrið samt um, at tað eisini vísir styrki at taka ábyrgd fyri avbjóðingunum lýstum í einum slíkum gjøgnumskygdum skjali.
Víst varð eisini á, hví Setrið ikki hevði fylgt tilmælinum um góðskutrygging og góðskumenning frá fyrra uttanhýsis eftirmetingini á sinni, sum hesin eftirmetingarbólkurin spurdi um.
Samanumtikið varð Stýrið samt um, at skjølini til uttanhýsis eftirmetingarbólkin eru góð og væl fyrireikað til uttanhýsis eftirmetingarbólkin, sum vitjar 12.-16. september 2022. Stýrið bíðar spent eftir niðurstøðunum frá eftirmetingarbólkinum.

*10. Møguligar niðurstøður frá uttanhýsis eftirmetingini og næsta strategiætlan við nýggjari leiðslu*

Hetta málið varð ikki viðgjørt, og verður á skrá til næsta stýrisfund.
**Atgerð: Rektarin at greiða frá tilgongdini av eftirmetingini, niðurstøðunum og viðmælunum frá eftirmetingarbólkinum til næsta stýrisfund.**

*11. Stýrisformaðurin tekur samanum*

Stýrisformaðurin takkaði fyri fundin, og eisini uttanhýsis limunum, sum vóru komnir frá útlondunum. Næsti stýrisfundur verður 24. november 2022. Ynskið er, at allir limir kunnu møta á staðnum.

**Fundurin endaði kl. 11:45.**